## Hundurin beit

Randi Jacobsen

Í seinastu viku varð ein 11 ára gamal drongurin í Skopun bitin av hundi.

Drongurin fór til kommunulæknan, men bitið varð ikki álvarsligt og ikki var neyðugt við nakrari viðgerð.

Foreldrini kundu hugsað sær, at eigarin varð biðin um at halda hundin inni, men tað var ikki neyðugt. So skjótt sum eigarin var komin eftir, at hundurin hevði bitið, tók hann lívið av hundinum.

## Rok umborð á línubáti

Randi Jacobsen

Í nátt sótu tveir útlendingar, sum sigla við linubátinum Polarstjørnuni, umborð og balladust, og tað endaði við roki.

Onkur, sum kom framvið, sá ein mann á brúnni í Klaksvík standa og bløða, og tað fekk politiið boð um.

Politiið fór við manninum á skaðastovuna. Hann segði, at hin maðurin umborð hevði skallað seg.

Samstundis varð hin maðurin tikin. Hann hevði eina heilt aðra søgu at siga, tá ið hann í morgun varð avhoyrdur.

Fleiri útlendingar sigla við føroyskum skipum, og flestu teirra gista umborð, tá ið skipini eru inni.

# Doyði í ferðsluvanlukku

**Ein 21 ára gomul klaksvíksgenta doyði annað páskakvøld í ferðsluvanlukku í afrikanska landinum Zambia**

Randi Jacobsen

Í fleiri ár hava Nanna og David Lokama rikið ein skúla í afrikanska landinum Zambia. Nú eru bæði tey og onnur við hart rakt av eini ferðsluvanlukku, sum hendi annað páskakvøld.

Tvær 21 ára gamlar klaksvíksgentur vóru nýliga komnar niður til Zambia at hjálpa familjuni, sum í næsta mánaði skal hava sítt fjórða barn.

David Lokama, sum er úr Zambia, fór henda dagin ein túr við getnunum, og í bilinum vóru eisini ein italiumaður, ein afrikanskur maður og ein afrikanskur unglingi.

Tey ætlaðu at vitja eitt barnaheim í Norðurzambia, men komu ongantíð so langt.

Hvussu vanlukkan hendi, veit Jóhann Páll Joensen, sum er pápi Nannu, ikki. Hann heldur ikki, at nakar veit tað.

Onnur av teimum ungu klaksvíksgentunum, Rúna Joensen, doyði av løstunum. Hin gentan slapp betur men hevur tað alt annað enn gott, veit Jóhann Páll Joensen.

Versonur hansara, David Lokama, lá í gjár framvegis í óviti. Læknarnir hava tó havt samband við hann, men støðan var ikki góð.

Italiumaðurin og unglingin sluppu væl, men hin afrikanin lá eisini í óviti.




*Vanlukkan hendi har norðuri í Zambia. Tey vóru á veg at vitja eitt barnaheim*

# Klæðir til stórar kvinnur

**Leygardagin letur ein handil við kvinnuklæðum í øllum støddum upp í Havn**

*Gunnvá Midjord hevur handil í Roskilde í Danmark og fer nú at vita, hvussu grundalagið er fyri einum handli av sama slag í Føroyum*



Randi Jacobsen

Tað var eina ferð í Havn ein handil, sum seldir klæðir til kvinnur í øllum støddum.

Nú eru fleiri ár liðin, síðan tann handilin læt aftur, og síðan hevur vøruútvalið í Føroyum av klæðum í størri støddum verið avmarkað. Tí hava fleiri stórar kvinnur verið noyddar at fara av landinum at keypa klæðir.

Gunnvá Midjord, sum í hálvt triðja ár hevur havt ein slíkan handil í Roskilde í Danmark, letur leygardagin upp eina deild í Havn. Handilin fær samma navn sum handil hennara í Roskilde, Gunnvá.

– Fleiri fólk hava biðið meg koma til Føroya, tí tey siga, at tørvur er á einum slíkum handli í Føroyum, sigur Gunnvá Midjord.

Hon fer ikki bara at selja klæðir til stórar kvinnur. Støddirnir verða millum 36 og 56, og øll klæðini verða at fáa í øllum støddum, og hetta verða smart klæðir.

Handilin verður í húsinum á horninum Bøgøta-Dr. Jakobsensgøta.